SKJAL A

LM-019/2020

ÍBÚÐ.FO

18 LEIGUÍBÚÐIR Í FUGLAFIRÐI

18



18

ÍBÚÐ.FO

18

Farið verður undir at byggja 18 lyklaklárar leiguíbúðir á Toftanesvegi 15 í Fuglafirði

Nýggju íbúðirnar verða bygdar í náttúruvøkrum umhvørvi tætt við Gjógvará, heilt oman móti sjóvarmálanum. Hetta er fyrsta íbúðarverkætlan í Føroyum, har bygt verður so tætt niðri við fjøruna. Millum íbúðarbygningin og fjøruna verður gjørd ein almenn gøta, har fólk hava høvi til at síggja og fylgja við í øllum tí lívi og virkemi, sum Gjógvará, fjøran, bygningarnir, neystini og grannalagið geva býnum.

Bygdur verður ein bygningur í trimum hæddum við seks leiguíbúðum á hvørjari hædd. Hvør leiguíbúðin er 92 fermetrar til støddar, og tær hava allar góð atkomuviðurskifti.



LM-019/2020



ÚTSÝNIÐ



ØKIÐ, IÐ ER SETT AV TIL LEIGUÍBÚÐIR

Hvør kann leiga?

Tað stendur einum og hvørjum frítt at leiga eina íbúð.


Hvønn hóskar íbúðin til?

Íbúðin er innrættað soleiðis, at hon hóskar væl til bæði støk ella eitt par. Somuleiðis tey, ið eiga hús, men nú ætla at raðfesta øðrvísi og flyta í íbúð.

EYSTURSÍÐA



VESTURSÍÐA



LM-019/2020

LM-019/2020


Somuleiðis hóska íbúðirnar væl til eina familju, eitt nú til eitt lesandi par við tveimum børnum, sum flytir heim aftur til Føroyar eftir loknan lestur.

Fólk, sum hava fylt 60 ár, hava framíhjárætt at leiga í minsta lagi 7 av teimum 18 íbúðunum, so allar umstøður eru gjørdar til, at her er gott at búgva, eisini tá ið árini koma.

Hvørja trygd havi eg sum leigari?

Íbúðirnar eru bygdar til at leiga út, og tú kanst leiga, so leingi tú hevur hug.





INNRÆTTING


Íbúðin er innrættað við duri, tveimum kømrum, wc umframt køki og stovu við altan


Eisini ber til at velja íbúð við einum eyka kamari soleiðis, at trý kømur eru í íbúðini. Harumframt er goymslurúm til hvørja íbúð.

Bæði bygningur og íbúð verða gjørd úr dygdar- og haldgóðum tilfari, og talan er um eina góða og ljósa íbúð, sum nú kann gerast karmur um lívið hjá júst tykkara familju.



LM-019/2020






ÍBÚÐ TYPA 1

ÍBÚÐ TYPA 2

LEIGUKOSTNAÐUR
ÍBÚÐ TYPA 1
KR. 6.500,-
UM MÁNAÐIN

LEIGUKOSTNAÐUR
ÍBÚÐ TYPA 2
KR. 6.750,-
UM MÁNAÐIN



Nær kann eg at flyta inn?

Arbeiðið at grava út og planera fer í gongd nú, og klárt er at flyta inn seinna hálvár 2022.

Nær fái eg at vita, um eg fái eina leiguíbúð?

Tey, sum hava hug at leiga íbúð, skriva seg upp, og um 1-2 mánaðir fæst at vita, um tey hava fingið eina leiguíbúð. Hjálagt er umsóknarblað at fylla út.



Hvussu nógv kostar at leiga?

Byggiharri og útleigari leggja stóran dent á, at leigukostnaðurin er kappingarførur við aðrar nýbygdar leiguíbúðir í Føroyum. Leigukostnaðurin liggur undir miðal fyri íbúðir av slíkum slagi.



LM-019/2020

_LM-019/2020

18

Hvør leigar íbúðirnar út og umsitur tær?

Sp/f ÍBÚÐ.FO stendur fyri allari umsiting og øllum samskifti við leigarar. Endamálið hjá ÍBÚÐ.FO er at vera størsti privati íbúðarútleigari á tí føroyska bústaðarmarknaðinum.

Hvør eigur íbúðirnar?

P/f Toftanes eigur tær 12 íbúðirnar, og Fuglafjarðar kommuna eigur hinar 6. Endamálið hjá P/f Toftanes er einans at eiga íbúðir við tí endamáli at leiga út. Endamálið hjá Fuglafjarðar kommunu er at skapa karmar fyri, at fólk, ið eru 60 ár og eldri, kunnu leiga eina dygdargóða íbúð í býnum.

Hvør byggir?

Sp/f TN Bygging hevur høvuðsarbeiðstøkuna at byggja íbúðirnar. Felagið hevur meir enn 20 ár á baki sum byggivirki og hevur drúgvar royndir við bygging.
Sp/f TN Bygging hevur áður havt sum høvuðsarbeiðstøku at standa fyri slíkari íbúðarbygging.


ÍBÚÐ.FO

P/F TOFTANES


FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

TN BYGGING
BYGGIVIRKI & TEKNISTOVA


LM-019/2020



NORÐURSÍÐA




SUÐURSÍÐA MILLUMBYGNINGUR



SUÐURSÍÐA

ÍBÚÐ.FO



18

18 LEIGUÍBÚÐIR Í FUGLAFIRÐI

GRAFIA ESTRA

LM-019/2020